MIÐFLOKKURIN
lyfti um sjúklingasamskipara og persónligan fylgjara!
Vangamynd síða 9

Sosialurin
VIKUSKIFTISBLAÐIÐ HJÁ MIÐLAHÚSINUM | 11. MAI 2018 | ÁRG. 91, BLAÐ NR. 53
30 KR
5 707265 100067 >
...GOTT VIKUSKIFTI

VIKUSKIFTI

Dømdur fyri at søkja eftir manni:

SPILLA PENGAR UPP Á TVASS

– Hetta málið snýr seg ikki um eitt maktstríð millum kynini. Hetta er bara enn eitt dømi um politiska korrektheit, sum gjøgnumseyrar samfelagið, sigur Gunnar Breckmann, sum fyrr í vikuni varð dømdur fyri brot á javnstødulógina, tí hann søkti eftir goymslumanni s 6-8

TEMA
Stórt tema um Føroyar og Arktis

Marita Rasmussen:

Vinnulívið er til reiðar s14-15

Steintór skrivar krimi:

Tey hámentaðu verða tey svikafullu s18-19

Minst til mammudagin
Sunnudagin 13. mai
Opið kl. 8–14

Høvi verður at keypa blómur og morgunbreyð

Blómutyssi úr 250,-

Fípan
Tlf: 34 19 60

Gunnar Breckmann:

NEKARAKYSS, ASTRID LINDGREN OG POLITISK KORREKTHEIT

– Hetta málið snýr seg als ikki um eitt maktstríð millum kynini frá okkara síðu. Hetta er bara enn eitt dømi um politiska korrektheit, sum gjøgnumseyrar samfelagið. Tað sigur Gunnar Breckmann, sum fyrr í vikuni fekk bót fyri brot á javnstøðulógina, tí fyritøkan hann arbeiðir hjá, søkti eftir goymslumanni.

MILDRIÐ JACOBSEN
MILDRID@SOSIALURIN.FO

– Í hesum førinum var javnstøða yvirhøvur ikki viðkomandi. Veruleikin er, at starvið á goymsluni krevur ein krútsterkan mann, sum eisini hevur kunnleika til timbur- og monteringsarbeiði, og sjálvandi átti privata fyritøkan hjá okkum at havt loyvi til at søkt eftir honum. At vit so verða meldað fyri brot á javnstøðulógina, tí vit søkja eftir goymslumanni heldur enn goymslufólki, er eitt greitt tekin um, at politiska korrektheitin er farin fullkomiliga av sporinum.

Tað sigur Gunnar Breckmann, sum arbeiðir í fyritøkuni Eikini, og sum í vikuni varð dømd í Føroya rætti fyri brot á javnstøðulógina. Fyritøkan fekk 1.000 krónur í bót, tí hon í starvslýsing søkti eftir goymslumanni.

Dómarin metti, at fyritøkan var sek í at gera mismun millum kynini, tá søkt varð eftir manni, tí tað ber ikki til at siga, at kvinnur ikki megna at røkja starvið, hóast talan er um tungt arbeiði.

– Eg veit sjálvandi ikki, um ein kvinnuligur, eysturtýskur kúluvarpari frá sjeytiárunum ella áttatiárunum hevði orkað arbeiðið. Tað skal eg ikki kunna siga, sigur Gunnar Breckmann. Hann leggur afturat, at ein lóg er ein lóg, og at tað, at fyritøkan er dømd, er, sum tað er. Eisini vísir hann á, at lógargreinin, ið tey eru dømd eftir, er neyðug í nógvum øðrum samanhangum.

Kvinnur og menn eru lukkutíð ikki líka

Hann leggur áherðslu á, at tað er umráðandi at hava eina javnstøðulóg, tí tað er neyðugt at verja ávís øki og tryggja, at vit øll hava somu møguleikar í almenna rúminum og á øllum arbeiðsplássum. Tað er púra klárt, sigur hann.

Hann vísir eisini á, at javnstøða so sanniliga valdar í Eikini, har helvtin av starvsfólkunum eru kvinnur og helvtin menn.

– Og Gud havi lov fyri tað. Kvinnur eru so nógv dugnaligari enn menn á so øgiliga nógvum økjum. Tað eru vit allir samdir um herúti. Men tað er farið alt ov langt í tráanini eftir at javnseta kvinnur og menn kropsliga. Vit eru tíbetur ikki líka, staðfestir Gunnar Breckmann.

So kunnu vit eins væl fara at seta spurnartekin við ítróttarkappingar, sum eru býttar sundur í kvinnudeild og mansdeild. Skulu tær so eisini leggjast saman?

– Tað er ein kropsligur munur á okkum menniskjum, og tað skal tað eisini vera, sigur Gunnar og leggur afturat, at hann fyrr í vikuni við stórum áhuga las grein í miðlunum um knætrupulleikar hjá kvinnum í hørðum ítróttargreinum.

– Hetta starvslýsingarmálið hevur so lítið upp á seg. Ongin hevur verið fyri órætti, og ongin skaði er hendur. Fyri 95 prosent av fólkinum er hetta málið fullkomiliga óáhugavert. Rætturin átti at havt onnur álvarsligari mál at tikið upp, heldur enn at spilla hart tjentar skattakrónur uppá sovorðið tvass, heldur Gunnar.

Nekarakyss og Pippi

Gunnar heldur, at í heila tikið eru vit farin av sporinum við so nógvum her í samfelagnum. Einki er loyvt longur, og ongin má siga nakað, heldur hann.

Hann nevnir sum dømi, at allar hansara dagar hevur tað verið púra nátúrligt at siga til dømis nekarakyss. Sigur ein nekarakyss í dag, verða fólk rættað við einum moralskum peikifingri og fáa at vita, at tað er eitt rasistiskt orð, sum er bannlýst.

– Hvat er galið við orðinum nekarakyss? Tað hava vit altíð sagt, líka til orðið "flødebolle" knappliga bleiv meir politiskt korrekt. Mær vitandi hava vit ongantíð sagt nekarakyss í einari neiligari merking. Nú er tað orðið brádliga ein trupulleiki. Nú eitur tað rómabolli, men tað er væl eisini eitt ókvæmisorð, um tað verður misbrúkt, heldur Gunnar.

Hann sigur, at tað sama ger seg til dømis galdandi við bókunum um Pippi Smokkulegg hjá Astrid Lindgren, sum annars var ímyndin av einum kvinnuslóðbrótara. Nú eru barnabøkurnar, sum eru viðkendar kring allan heimin, ikki politiskt korrektar longur, sigur hann og sipar til, at tá bøkurnar um Pippi Smokkulegg vórðu endurprentaðar fyri nøkrum árum síðani, hevði pápi Pippi fingið annað navn. Upprunaliga navnið, sum var nekarakongurin, er í nýggju útgávuni broytt til suðurhavskongurin.

– Tað, sum var púra nátúrligt at siga, og sum als ikki varð sagt í einari neiligari merking, er ikki í lagi longur. Alt er blivið ein trupulleiki, sigur Gunnar, sum ikki skilir, hví børnini hjá okkum í 2018 skulu verða áløgd at hava ringa samvitsku av eitt nú trælahaldi, sum var fyri fleiri øldum síðani, ella at orðið nekarakyss er eitt ókvæmisorð, sum børnini ofta yvirhøvur ikki skilja ella vita nakað um.

– Trælahald er eitt myrkt kapittul. Tað er tað væl neyvan nakar, ið setur spurnartekin við. Lærið børnini so tað, og kom so víðari. Eg var ein sightseeing siglitúr í Nyhavnini einaferð, og minnist meg rætt, greiddi ferðaleiðarin ferðafólkunum frá, at svenskir trælir hava bygt partar av Nyhavnini. Mær vitandi gongur eingin svenskari súrur av tí orsøk í dag. So kom víðari.

– Um vit ynskja at gera mun, bæði tá talan er um líkarætt og onnur átroðkandi øki, so er nokk at tríva í úti í stóru víðu verð. Tað sokallaða stríðið her heima er til alla lukku langt síðani vunnið, og tíverri eisini koppað í hina grøvina, sigur hann.

Summi kunnu siga alt

Hann fýlist eisini á, at munur verður gjørdur á, hvør hevur loyvi til at siga hvat.

– Tey, sum hoyra til ein sonevndan minnilutabólk, kunnu siga tað, sum teimum lystir. Bara tað er politiskt korrekt, so kanst tú siga, hvat tú vilt. Onnur "ørvitishugsandi" skulu bara akta og tiga, sigur Gunnar.

Hann sigur, at fólk, ið eru nóg gløgg til at síggja tingini úr einum víðari sjónarhorni, hava samfelagsskyldu at upplýsa fyri fólki, hvat ein kann loyva sær og ikki. Serliga at upplýsa okkara ungu borgarar, sum kanska ikki sjálvir eru førir fyri at skapa sær eina mynd av, hvussu tingini hanga saman.

– Eisini millum annað tað, at húðarlitur, kyn ella kynsligur samleiki er ikki orsøk til at kalla øll "hini" fyri rasistar, homofobar, mannchauvinistar, ella hvat man í hesum døgum nú einaferð gongur runt og tveitur um seg og gremur seg um, sigur Gunnar Breckmann.

– Hetta kemur undir samleikapolitikk, har samleikin er argumentið í sær sjálvum, og samleikin verður brúktur til at tiltuska sær "minniluta" fyrimunir í samfelagnum, antin tí tú hevur ein ella annan huðarlit, kyn ella, hvussu títt kynslív er.

Gunnar sigur, at tey fólkavaldu,

Framhald á síðu 8

lærarastættin og miðlarnir hava alla ábyrgdina av, at hetta ikki verður gjørt.

– Ístaðin hevur man valt at gera tað øvugta - at dyrka samleikapolitikk. Bæði í skúlum, miðlum og í tinginum. Og tí at tey fólkavaldu og miðlarnir ikki eru sína uppgávu vaskin, er einki fantilsi á, hvussu fólk uppfata nógv av hesum hugtøkum, sigur hann.

– Nær í himmalsins navni er tað blivð løgtingsins uppgáva at skula kjakast um og definera kynslívið hjá fólki. Hvat er hetta fyri tvætl. Jabba og sjabba tað sama møsnið upp í fleiri ár, og tað fær ongan enda. So er tað gudhjálpitúmær #metoo rørslua, vit skulu hoyra um nú dag út og dag inn. Hvør filmstjørna hevur følt upp á hvønn, og hvør filmsframleiðari hevur klípt hvønn hvar. Hann náði tú meg, sigur Gunnar Breckmann.

Demokratiskur rættur

Tá Eikin søkti lýsti eftir goymslumanni, tók kjak seg upp á facebook um, at søkt varð eftir manni heldur enn fólki. Stutt eftir setti formaðurin í Javnstøðunevndini seg í samband við Eikina og bað tey broyta starvslýsingina, tí hon var brot á javnstøðulógina.

– Eg segði nei. Eg dugi ikki at síggja, at mín demokratiski rættur at reka mína fyritøku, soleiðis sum eg haldi vera best, skal takast frá mær. Konufólk eru sum sagt so nógvar ferðir betri til so nógv, men akkurát í hesum førinum er talan um hart kropsligt arbeiði frá morgni til myrkurs hvønn einasta dag.

Gunnar segði nei til at broyta starvslýsingina. Hann sigur seg ikki duga at síggja nakað endamál við at søkja eftir goymslufólki, tá hann í hesum føri hevði kent seg noyddan at sæð burtur frá møguligari umsókn frá konufólki.

– Og tað haldi eg, er at halda fólk fyri tað turra spott. Tað er niðurgerandi, sigur Gunnar, sum ongantíð hevur upplivað, at ein kvinnuligur umsøkjari hevur søkt starv á goymsluni hjá Eikini.

Hann greiðir frá, at talan er um sera tungt innbúgv, og at tað javnan er sera torført at koma inn í húsini við tí. Ofta skulu fleiri hundrað kilo lyftast og berast upp gjøgnum smalar trappur ella fáast inn gjøgnum okkurt vindeyga.

Fittness

Tá málið var fyri í rættinum, kom fram, at viðhvørt er neyðugt við fleiri monnum at bera eitt nú granittplátur, sum kunnu viga omanfyri 300 kilo.

– Tá ein ikki skilur, hvussu ræðuliga tungar flestu av dagligu uppgávunum hjá okkara goymslufólki eru, so má tað vera tí, at ein ikki veit, hvat tað snýr seg um. Er tað ein í røðini av okkum, sum bera, ið ikki orkar, so kann skaði henda. Vit hava eisini kundar og trygdina hjá arbeiðsfólki at hugsa um.

– Hvat siga kundarnir, um granittplátan, sum kann viga upp í 200-300 kilo, sum teir skulu hava, verður mist, ella stóra óformliga sofan, sum skal upp gjøgnum ein stiga upp á aðru hædd og inn gjøgnum eitt vindeyða datt í túnið, tí goymslufólkini ikki orkaðu at bera hana, spyr Gunnar. Hetta er eisini galdandi fyri menn, ið søkja. Tað eru avgjørt ikki allir, ið hava likamligu styrkina til hetta slagið av arbeiði, sigur hann.

Hann heldur eisini lítið um, at ákærin í rættinum fleiri ferðir spurdi eina kvinna, ið arbeiðir í Eikini, um hon vandi fittness sum um, at so átti hon at klára at lyft tað, hon hevði hug til. Formaðurin í javnstøðunevndini nevndi annars í rættinum, sum sikkurt rætt er, at hann visti um nógvar kvinnur, sum eru sterkari enn hann, sigur Gunnar.

– Og næstu ferð vit søkja eftir fólki til goymsluna, skal eg so viðmerkja, at eg søki eftir monnum ella eftir kvinnum, sum ganga til fitness? Hvat so við teimum kvinnunum, sum ikki ganga til fitness? Tí hevði eg helst eisini komið í trupulleikar av, sigur Gunnar.

Hann heldur lítið um hesa ovurumsorgan og sigur, at í stríðnum fyri at beina burtur ójavnan millum kynini, eru við endað í einari støðu, sum er líka ring um ikki verri og als ikki nøkrum til fyrimunar.

Menn hava mist sigarstovuna

Gunnar Breckmann fegnast um, at javnstøða valdar hvønn einasta dag á teimum flestu økjunum. Men í ávísum samanhangum er tað farið ov langt.

– Javnstøðustríðið er langt síðani liðugt. Nú situr maðurin í einum blomstrutum heimi við blondum, og alt er kritahvítt. Har verður hann sitandi sum ein sekkur, til hann verður varpaður út, tí hann ikki longur er tann maðurin, sum konan gifti seg við, sigur Gunnar skemtandi.

Hann vísir á, at vit skulu minnast til, at maðurin, sum konan gifti seg við, er uppaldur av einari aðrari kvinnu.

– Tað fyrsta konan ger, er at royna at broyta mannin. Men tá tey so sjálv fáa synir, so uppalir kvinnan synirnar á júst sama hátt, sum vermamman uppaldi mannin. Synirnir verða so aftur giftir við konum, sum royna at broyta teir, og so koyrir tað í ringrás.

– Talan er um skuggaboksing, og eg áni ikki hvør tað er, sum berjist móti hvørjum, sigur Gunnar. Bejast vit ímóti pápunum, synunum ella kanska manninum? Eg veit ikki, hvat alt hetta gongur út uppá, sigur Gunnar.

– Dreingir og vaksnir menn eru nógv hjálparleysari í dag enn fyrr. Teir duga ikki longur at lata seg í hosurnar, uttan at teir rópa eftir mammuni. Teir rópa eftir øllum. Hvar eru hosurnar, hvar er sápan, hvar eru gaggurnar, hvar er hetta og hatta. Tað einasta teir finna eftirhondini er fartelefonin.

Hinvegin, so heldur Gunnar, at menn mugu taka seg saman, og tá hugsar hann ikki um kynsstríð.

– Vit mugu so absolut traðka í karakter og veksa við uppgávuni. Læra at klára "hinar" uppgávurnar á jøvnum føti við kvinnurnar. Hetta er einasti vegur til fríheit. Men hetta mugu mammurnar eisini læra at hjálpa dreingjabørnunum við øll barna- og ungdómsárini. Curlinghalløjsið má simpulthen halda uppat, so tað hvílir eisini ein stór ábyrgd hjá teimum á hesum økinum.

Hann sigur, at samstundis sum alt hetta politiskt korrekta gongur fyri seg í almenna rúminum, bjóða vit nýggjari mentan inn í samfelagið. Einari mentan, sum avgjørt ikki byggir á javnstøðu.

– Hvussu ætla vit at takla tað stríðið, spyr hann. Hvussu ætla vit at samansjóða eina damu í burku og "Linse fra Bryggen"? Tað stríðið vinna vit so ikki, tað er púra vist.

Dýnulyfting

Gunnar heldur, at tað, at eitt slíkt mál sum hetta, endaði í rættinum, vísir týðiliga, hvussu langt av leið vit eru farin.

– Demokratiið hevur útlivað seg sjálvt. Alt ov nógv ráðandi fólk sleingja um seg í almenna kjakinum við háfloygdum candyflosstosi, og brúka fleiri orð enn neyðugt fyri at siga meir, enn tey vita. Øll skulu fram at at siga sína hugsan, sum so aftur ger, at absolut einki hendir. Hetta ber simpulten ikki til og heldur ikki í longdini. Vit hava tað so gott, at alt er bara flánað út. Vit finna bara alla tíðina upp á nýggjar trupulleikar, sum als ikki eru trupulleikar men reinir luksustrupulleikar, sigur hann.

– Vit mugu læra at seta prís upp á tað, vit hava fingið givið upp í hendurnar, og á skynsaman hátt bera tað víðari til næsta ættarlið. Tað gera vit best við at leggja tað besta í børnini og ungdómin. Og tá hugsi eg ikki um eina charterferð, merkisvørur og nýggjasta Iphonemodellið, sigur Gunnar.

Hann heldur, at tað verður farið alt ov nágreiniliga fram eftir lógarinnar bókstavi, og at vit mugu ansa eftir, at vit í hesum teldu- og skrivstovutíðin ikki missa sambandið við tað harða arbeiðslívið.

– Nógv fólk stríðast og skræða ein vissan afturpart sundur hvørja viku fyri at fylla landskassan, sum so í stóran mun verður oyðslaður burtur. Eingin verður drigið til svars fyri oyðsl á fleiri hundraðtals milliónir. Tað verður bara flent býtt og sagt, at soleiðis er tað bara. Men at hála eina lítla fyritøku í rættin fyri eina starvslýsing, tað fær øll upp úr stólinum. Hví fær alment oyðsl ikki avleiðingar, spyr Gunnar Breckmann.

– Alt ov nógv hava mist sambandið við arbeiðslívið. Alt snýr seg um dýnulyfting, og fólk sita bara og tveita um seg við lógargreinum, sigur hann.